LM-011/2023

Fylgiskjal 3

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Til Almanna- og mentamálaráðið

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna

Tórshavn, 13. august 2023

**Hoyringssvar til uppskot til Løgtingslóg um stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík**

Visit Faroe Islands tekur undir við uppskoti til Løgtingslóg um stuðul til stórhøll í Hoyvík, sum gevur landsstýriskvinnuni heimild til at lata stuðul til verkætlanina Føroya Arena frá 2022 til og við 2025.

At fáa eina stórhøll sum Føroya Arena, hevur stóran týdning fyri ferðavinnuna í Føroyum. Hon stuðlar upp undir vinnuferðavinnuna, serliga stórar ítróttarkappingar og stórar ráðstevnur og framsýningar.

Eisini var hetta eitt av tilmælunum í Vakstrarforum, tilmæli nr. 12:

*'Ein stórhøll er ein varði á vegnum hjá ítróttini í Føroyum og ein fortreyt fyri stórum tiltøkum í vinnuferðavinnuni. Tað er umráðandi, at hugsjónin við komandi stórhøllini er burðardygg og endurskapandi, so hon verður eitt savningarstað fyri føroyskan ungdóm, har rørsla og tað heilsugóða lívið er í miðdeplinum. Aftur at hesum gevur stórhøllin ítróttini møguleika at skipa fyri heilt stórum tiltøkum, herundir altjóða ítróttarkappingum, stórum e-sport kappingum og ítróttarkongressum'*

Vinarligar heilsanir

Visit Faroe Islands

Annleyg Lamhauge

Meetings & Events manager